

## Skattaavtalur við Jersey og Guernsey

Avtalur eru nú undirskrivaðar við Jersey og Guernsey um útflýgging av skattaupplýsingum og um dupultskatting. Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður við fíggjarmálum, undirskrivaði avtalurnar fyrrapartin saman við hinum norðurlendsku fíggjarmálaráðharrunum á Norðurlandaráðsfundi í Helsinki. Avtalurnar merkja, at føroysku skattamyndugleikarnir kunnu fáa skattligar upplýsingar frá Jersey og Guernsey. Samstundis verða dupultskattaavtalur gjørdar við báðar oyggjarnar í Ermasundi. Avtalurnar eru ein liður í eini OECD-verkæltan, sum skal koma altjóða skattaundandrátti í sonevndu skattaparadísunum til lívs.

# Eysturoyingar boðsendir á fund um undirsjóvartunnil

**Annika Olsen, landsstýriskvinna í samferðslumálum roynir nú at fáa gongd á arbeiðið at gera undirsjóvartunnil ímillum Streymoy og Eysturoy og fyrsti fundurin við privata felagið aftanfyri tunnilin, verður longu hósdagin**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er ætlanin at fáa gongd á arbeiðið at gera nógv umrødda undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy.

Samgongan er samd um, at tunnilin skal verða verandi á privatum hondum, soleiðis sum upprunaliga ætlað og Annika Olsen, landsstýriskvinna í samferðslumálum, ætlar ikki at leggjast á boðini.

Hon hevur longu boðsent privata felagnum, sum tók stig til tunnilin á fund at tosa um møguleikarnar fyri at fremja ætlanina.




*Annika Olsen, landsstýriskvinna í samferðslumálum, ætlar ikki at leggjast á boðini og longu hósdagin hevur hon boðsent partafelagið aftanfyri ætlaða undirsjóvartunnilin undir Skálafjørð á fund at umrøða størstu samferðsluætlan í Føroya søgu*

Fundurin verður í ovurmorgin, hósdagin.

Annika Olsen sigur, at talan verður ikki um ein beinleiðis samráðingarfund um hvørjar treytir, privata felagið fer at virka undir.

- Ætlanin við hesum fyrsta fundinum er at vita, hvar vit flóta og, hvar ætlanin liggur, sigur hon.

Hon sigur sostatt, at ætlanin við hesum fundinum er at fáa eina kunning frá privata felagnum aftanfyri ætlanina.

- Eitt, sum vit vilja fáa greiði á, er um hetta er ein verkætlan, sum privata felagið framvegis er áhugað at fremja.

- Tað er nógv hent seinastu tíðina og tí má fyrsta stigið vera at vita, hvar ætlanin liggur og, um felagið framvegis er áhugað í at fremja hana yvirhøvur, sigur hon.

# Bankar framvegis áhugaðir at fíggja

**- Hóast fortreytirnar eru nógv broyttar, er framvegis áhugi fyri at fíggja risastóru verkætlanina um undirsjóvartunnil ímillum Streymoy og Eysturoy**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit hava avgjørt varhugan av, at fíggingarstovnar framvegis eru sinnaðir at fíggja undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy.

Tað staðfestir Ingi Højgaard, formaður í nevndini í privata felagnum, sum stendur aftanfyri verkætlanina.

Hann sigur, at tey hava havt følarar úti hjá útlendskum bankum og tað sama hevur Eik gjørt.

Og afturmeldingarnar eru, at áhugi er framvegis fyri at fíggja ætlanina.

- Sostatt meta vit framvegis, at vit kunnu reisa fíggingina til verkætlanina og samstundis halda vit avgjørt, at talan framvegis er um eina sera áhugaverda verkætlan, hóast fortreytirnar eru nógv broyttar seinastu tíðina.

### Alt veldst um treytirnar

Men Ingi Højgaard staðfestir, at alt veldst sjálvandi um, hvørjar loyvistreytirnar frá landsstýrinum vera.

- Tað, sum er alt avgerandi er, hvussu stórt mesta avkastið av eginpeninginum verður og, hvussu long loyvistíðin verður - um tað skulu verða 15 ár ella 30 ár, til landið yvirtekur tunnilin.

- Jú longri loyvistíðin verður, jú tryggari og áhugaverdari er íløgan hjá privatum.

Ingi Højgaard sigur, at tað eru grundleggjandi spurningar, sum mugu fáast upp á pláss fyrst av øllum, tí tað er grundarlagið undir verkætlanini.

Sjálv linjuføringin skal eisini leggjast, tí tað er ikki avgjørt enn.

### Fleiri loysnir

Talan kann vera um fleiri loysnir. Tvær av loysnunum eru ein tunnil úr Streymoy, antin yvir á Strendur ella Toftir og so undirsjóvartunnil undir Skálafjørð ímillum Strendur og Toftir.

Hinvegin er Landsverk komin til ta niðurstøðu, at fyri samfelagið er besta loysnin at gera tunnilin yvir á Strendur og so brúgv um Skálafjørðin.

- Krevur landsstýrið hesa loysnina, mugu nógv fleiri kanningar til fyri at vita um hetta er ein verkætlan, sum vit eru áhuga í, tí hesi loysnini hava vit ikki arbeitt við og sostatt heldur ikki kannað, sigur Ingi Højgaard.

Hann leggur afturat, at tað fer sjálvandi at seinka ætlanini tilsvarandi, tí so má øll verkætlanin endurskoðast.

Men verður ein av hinum linjuføringunum vald, er mestsum klárt at fara í